## Ljósið fyrireikar seg til HM

**Kvinnurnar hjá fimleikafelagnum Ljósinum eru í hesum døgum í Danmark, har tær skulu taka lut í HM í estetiskum fimleiki um vikuskifti. Liðið fór til Danmarkar mánadagin og hevur verið á venjingarlegu á Fjóni**

FIMLEIKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Venjingarlegan hjá Ljósinum var á kenda fimleikaháskúlanum í Ollerup á Fjóni, har nógvir føroyskir fimleikar hava gingið. Har hava kvinnurnar vant og livað sum fimleikarar burturav í nakrar dagar.

### Kappast í Greve

Seint mikudagin gekk leiðin hjá Ljósinum til Keypmannahavnar, har tær hava møguleikan at fínpusssa framførsluna og eisini venja seg við umhvørvið, ið kappast verður í.

Sjálv HM-kappingin verður í Greve. Fríggjadagin er innleiðandi umfarið, har 28 lið kappast. Dagin eftir, leygardagin, verður finalan, har átta lið fara at stríðast um HM-gullið.

Umframt Ljósið hava bæði Havnar Fimleikafelag og Støkk úr Runavík eitt lið við í HM-kappingini, og spennandi verður at frætta, hvussu tey føroysku liðini fara at standa seg.

# Føroyameistararnir fara eftir gullinum

**Kvinnuliðið hjá Havnar Fimleikafelag fór týsdagin til Danmarkar, har tær saman við tveimum øðrum føroyskum liðum fara at taka lut í HM-kappingini í estetiskum fimleiki**

FIMLEIKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Kvinnuliðið hjá Havnar Fimleikafelag, sum tekur lut í HM-kappingini, telur nígggju fimleikarar.*

*Mynd: Pætur Niclasen*

Tað hevur gingið stak væl hjá Havnar Fimleikafelag seinnu árini. Felagið hevur havt fleiri lið, sum hava tikið lut í kappingini um danska meistaraheitið, og hesi lið eru komin aftur við heiðursmerkjum av ymsum slag. Nú fara kvinnurnar hjá felagnum at gera eina roynd at fáa gullið í heimsmeistarakappingini.

### Vant hart

Ferðalagið hjá Havnar Fimleikafelag, sum telur 45 fólk, harav nígggju eru fimleikarar, fór til Danmarkar týsdagin.

Undan fráferðini hevur kvinnuliðið vant sera hart, og sunnudagin høvdu tær eina seinastu venjing í Hoyvíkshøllini, hagani myndirnar eisini eru. Tá vandu tær fyrst eitt sindur, og síðani var framførslan hjá teimum sýnd fyri teimum, ið høvdu áhuga í hesum.

Sum áðurnevnt eru tað trý føroysk kvinnulið, sum fara at taka lut í HM-kappingini, sum verður í Greve fríggjadagin og sunnudagin. Umframt Havnar Fimleikafelag eru tað Støkk og Ljósið.

Kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag eiga tó allarhelst at metast sum sterkasta føroyska liðið, tí tær vunnu føroyameistarakappingina í ár.

Sosialurin fer sjálvsagt at fylgja væl við, hvussu tað gongur hjá teimum trimum føroysku liðunum í HM-kappingini.



*Tá ið vant var í Hoyvíkshøllini sunnudagin, høvdu kvinnurnar hjá HF eisini eina framførslu av seriuni, ið tær fara at framføra í HM-kappingini.*

*Mynd: Pætur Niclasen*

# CSKA vann frálíka finalu

**Russiska liðið CSKA Moskva vann mikukvøldið 3-1 á Sporting Lissabon í eini sera undirhaldandi UEFA-Cup finalu**

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var tó ikki nógv, sum bendi á, at russiska liðið skuldi enda omaná, tá ið finalan var hálvrunnin. Sporting Lissabon, ið hevði fyrimun av at verða á heimavølli, var greitt betra liðið fyri steðgin, og teir høvdu eisini tikið leiðsluna í dystinum.

### Fyrimyndarligt kontraspæl

Sporting Lissabon niðurspældi russiska liðið fyri steðgin, og tað var fult uppiborið, at teir løgdu seg á odda, tá ið fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Rogerio fekk bóltin áraka brotsteigarmarkið hjá CSKA, og hann langaði bóltin í meskarnar dygst upp undir samankomingina. Portugisiska liðið hevði eisini fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, men tað eydnaðist teimum ikki.

Unga manningin hjá CSKA Moskva var tó sum hamskift eftir steðgin. Teir vóru nógv ágrýtnari, og tað tóktist sum um, at teir nú tordu betur at spæla sítt spæla. Hetta gav eisini at bíta, tá ið góðir tíggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki.

CSKA fekk eitt fríspark nakað úti í høgra borði, og Aleksei Berezoutski setti krúllin undir bóltin inni í brotsteiginum, og bólturin stakk í vøllin, áðrenn hann fór í netið aftan fyri Ricardo í Sporting-málinum.

Nú var dysturin púra opin aftur, men tað gingu einans tíggju minuttir, so hevði russiska liðið, sum Roman Abramovich eigur ein stóran part í, lagt seg á odda. Hesaferð var talan um eitt skjótálop, har CSKA vístki fyrimyndarligt kontraspæl. Portugisiski leikarin hjá CSKA, Carvalho, sendi ein frálíkan bólt inn millum verjuspælararnar hjá Sporting, og Yuri Zhirkov gerst leysur, og hann sendir hegnisliga bóltin millum beinini á Ricardo og í mál til 2-1.

Sporting Lissabon gav tó ikki skarvin yvir, og tá ið eitt korter var eftir, var um reppið, at teir komu upp á javnt. Russiski málverjin Akinfeev hálvbjargar eini langskotsroynd, men Sporting heldur fast í álopinum, og ein bóltur verður sendur hegnisliga inn í málteigin, har ein Sporting-leikari roynir at benda í málið. Men bólturin rakar innarsíðuna á stongini, áðrenn hann støkkur í føvningin á CSKA-málverjanum.

Akinfeev ger so skjótt av og byrjar eitt kontraálop, og 19 sekund eftir at hann fekk bóltin, liggur hann í Sporting-málinum. Síðsta fótin á hesum kontraálopinum átti brasilski framherjin hjá CSKA, Vagnar Love, og harvið tryggjaði CSKA Moskva sær UEFA-Cup sigurin.

Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at eitt russiskt lið hevur vunnið eina europeiska kapping, síðani jarnmúrurin fall, men hetta er neyvan seinastu ferð, at vit hava hoyrt um hetta spennandi liðið, ið CSKA Moskva hevur.